## Dagbókin hjá 12 ára gamla Petur Alberg:

# Gerandisdagur í Havn í 1898

**Vit fara nú at endurprenta dagbókina hjá Petur Alberg. Í fyrsta umfari er tað dagbókin fyri 1898, tá ið Petur byrjaði at skriva hana sum 12 ára gamal. Vit endurgeva dagbókina nærum orðarætt, sum hon er skrivað**




Hetta er forsíðan á fyrstu dagbókini hjá Petur Alberg.




*Petur hevði eina avbera vakra handskrift, tá hugsað verður, at hann er bert 12 ára gamal.*



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

Dagbókin er eitt einastandandi skjal. Hon vísir lívið hjá einum drongi í Havn fyri meira 100 árum síðani. Hon vísir eisini lívið í Havn tá, eins og tað er rættuliga fitt av fiskivinnutíðindum í dagbókini. Tað er áhugavert at síggja hvussu upptikin hesin havnadrongurin er av ensku trolarunum, sum »eyðræna« okkara grunnar, og hvussu hann brennir fyri at fáa gjørt nakað við hetta óskil. Men fyrst og fremst vísir dagbókin ein ótrúliga skilagóðan 12 ára gamlan drong, sum fylgir við í tí sum gongur fyri seg, sovæl í Føroyum sum uttanlands, eins og hann hevur eina sjáldsama rættarkenslu. Hann er avgjørt í parti við tann minna mannin. Sum tað sæst er málið sum rímiligt er broytt nakað hesi 100 árini. Men Petur er so kønur í donskum, at hann neyvan hevur ein tann einasta skrivifeil í øllum, sum hann hevur skrivað. Bert fá ár seinni skrivaði hann eins fullkomið føroyskt. Vit hava nakrar viðmerkingar og eru tær skrivaðar í kursiv.

Dagbókin, sum gongur fram til 1901, hevur verið prentað í FF-blaðnum 1999 og 2000. Men hon tolir væl at verða endurprentað.

Vit hava gott samband við fyrrverandi formannin í Fólkatinginum Erling Olsen, og hann fekk dagbøkurnar í síni tíð. Hann skrivaði tá í eini jólaheilsu *"... jeg er vildt imponeret af den 13-årige Peturs dagbog. Han har både været en ualmindelig opmærksom dreng, som har suget en masse til sig, og så har han været i stand til at gengive sine indtryk på en sådan måde, så man tror, at der en professionel skribent, det har lavet dagbogsoptegnelserne...."*

Vit koma í hesum umfarinum at prenta dagbókina fyri 1898 í trimum pørtum av Miðvikuni, og myndatilfarið er fyri ein part úr skjalasavninum hjá Petur Alberg sjálvum.



*Henda myndin av Geilini og grannalag er frá 1856. Fremst á myndini er Baianstova. Húsini beint við síðuna av, tey eru eitt sindur í vinkul, eru húsini í Geil*

### Hvør var Petur Alberg?

Petur Alberg er fyrst og fremst kendur sum tann, sum gjørdi lagið til tjóðsangin »Tú alfagra land mítt«, sum Símun av Skarði setti orð til. 2. jóladag í ár eru 100 ár síðan hetta lag varð framført fyrstu ferð í Sloans sali við Tinghúsvegin. Júst tí er orsøk til at gera nakað burtur úr hesum manni. FF-blaðið er einasta blað, sum hevur havt sjálva søguna um, hvussu lagið varð til, og hesa forvitnisligu søguna fara vit at endurgeva í samband við tey 100 árini.

Petur var sonur Betti og Djóna í Geil. Djóni var sonur Poul í Geil og Onnnu, sum var dóttir Andrass Mortanson, fyrsta niðursetumann á Argjum. Djóni var ein framúr maður, og hann var slóðari á mongum økjum, sum til dømis innan fráhaldsrørslu, sjúkrakassa, urtagarðsrøkt, ídnað og mangt annað.

Betti og Djóni áttu fýra børn, Kristin, Poul, Petur og Anna. Serliga eru tað Kristin og Petur, sum vit minnast í dag. Kristin varð kendur sum tann hvassorðaði blaðstjórin á Tingakrossi, har Petur eisini átti sín leiklut, soleiðis sum tað eisini kemur at síggjast í dagbókini. Petur var meira hógligur og nýtti sínar gávur á meira friðarligum økjum, sum til dømis við at gera løg.

Hann var eisini sera virkin í ungmannafelagnum Baldursbrá fyrst í hini øldini og ikki minst í blaðnum við sama navni, sum felagið framleiddi til hvønn fund, og sum er til skjals á landsbókasavninum. Tað verður seinni høvi at koma nærri inn á lívið hjá Petur Alberg.

Petur hevur verið so professionellur, at hann hevur fingið sína dagbók »autoriseraða«, og tískil stendur á fremsta blaði:

**Denne bog autoriseres herved til Dagbog for Peter Alberg Isaksen af Thorshavn.**
**Thorshavn den 1. januar 1898.**
**Gunnar Winther.**
**Uden gebyr.**

### Dagbókin

Fyrst byrjar Petur við:
*Nogle Optegnelser om de forløbne Aar*

**1893**

**18.12** Blev Grundstenen nedlagt til den nye Kommunuskolebygning

**1894**

**1.10** Rejstes den nye Kommuneskolebygning

**1895**

**11.3** Begravedes min Bedste-